# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Kontra møguleikar fáa vit altíð, og so mugu vit vóna, at vit kunnu gagnnýta onkrar av hesum.*

*Jens Martin Knudsen*




*Føroyski hjálparvenjarin ásannar, at uppgávan er møtumikil. Men sær sjálvum líkt hevur Jens Martin Knudsen góðar vónir*

# Vilja byrja væl

**Hjálparvenjarin á føroyska landsliðnum ásannar, at fráveran verður tung at bera. Men dysturin í Portugal var góð fyrireiking í so máta, heldur Jens Martin Knudsen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Síðani føroyskur fótbóltur kom upp í altjóða fótbólt, hevur ein felagsnevnari verið púrasta fastur.

Jens Martin Knudsen vardi føroyska landsliðsmálið í nógv ár, og eftir hetta hevur hann virkað sum málmans- og hjálparvenjari hjá landsliðnum.

Tey 20 árini, sum hann hevur verið kring landsliðið, er tó sjáldan, at fráveran hevur verið somikið stór, sum hon er tað hesaferð, ásannar Jens Martin.

- Súna Olsen og Christian Lamhauge Holst vistu vit av fyri eini tíð síðani, og tí vóru vit fyrireikaðir til tað. Teir eru eisini partur av skapandi spælinum okkum, og tá vit neyvan koma at stýra nøkrum dysti í Beograd, var tað kanska ikki nøkur vanlukka í so máta. Heldur ikki hóast teir kunnu vera við til at halda bóltin í egnari røð og har við taka nakað av trýstinum burtur.

- Men síðani eru sjálvandi aðrir skaðar komnir, og teir hava á sín hátt rakt meinari, haldi eg. Tekur tú Fróða og Rógva, so eru teir eisini lyklaspælarar við nógvari rutinu. Og samstundis eru teir millum sterkastu spælarar okkara í loftrúminum, og tí er tað sera tungt at vera báðar fyriuttan, sigur Jens Martin Knudsen,

### Aftur til Landskrona

Samanlagt bendir hetta á, at føroyska spælið kanska verður mest átøkt tíðini í Landskrona, har tað javnan vóru 11 føroyingar í egnum brotsteigi.

Í øllum førum er Jens Martin sannførdur um, at talan verður um eitt rættiliga verjukent føroyskt lið.

- Eg rokni við, at tað verður á leið tað sama, sum vit sóu í Portugal, og í so máta var tann dysturin góð fyrireiking. Tað ræður fyrst og fremst um at standa væl í verjupartinum, og tað gjørdu vit í 85 minuttir ta ferðina. Kontra møguleikar fáa vit altíð, og so mugu vit vóna, at vit kunnu gagnnýta onkrar av hesum.

Og hvat er so eitt gott úrslit?

- Eg fari ikki at seta nøkur tøl á. Men tær báðar seinastu undankappingarnar hava vit byrjað rættiliga illa. Nakað sum hevur sett sín dám á bæði hópin og áskoðararnar fyri restina av undankappingini. Tað vóni eg, at vit sleppa undan hesaferð. Og hóast vit mangla týðandi og royndar spælarar, so havi eg gott mót. Í Portugal sóu vit í fleiri førum, hvussu menn vildu ofra seg. Og vilja teir tað, so hava vit fortreytirnar fyri at skapa eitt gott úrslit, heldur Jens Martin Knudsen.

# Strævin ferð

**Talan er um langa ferðing, áðrenn føroysku landsliðsspælaranrir í kvøld kunnu leggja seg á hotelkamarinum í Beograd**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Trý flogfør og nógv bíðitíð stendur á skránni hjá føroysku landsliðsspælarunum í dag.

Klokkan 8.15 í morgun varð farið á flog við flogfarinum hjá Atlantic Airways, og so var fyrsti steðgurin á ferðini í Billund. Har skuldi bíðitíðin vera á leið seks tímar, áðrenn flogið verður til Frankfurt seinnapartin. Og haðani verður so flogið til Beograd, har ferðalagið skal halda til komandi dagarnar.

Eftir ætlan skuldi flogfarið í Beograd seta seg klokkan 22.15, so klokkan fer helst at nærkast midnátt, áðrenn spælararnir kunnu fara í song.

Eisini var føroyska U21-landsliðið við á ferðini til Billund. Her skiljast hóparnir tó. U21-landsliðið skal til Aserbadjan, so í flogtíð bíðaði teimum ein enn longur ferð enn tann hjá A-landsliðshópinum.

# Rógvi ikki til Serbia

**Ein skaði í lærkrikanum hevur argað og krevur nú steðg í tvær vikur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Enn eitt avboð rakti føroyska landsliðshópin dagin fyri fráferðina til Serbia.

Rógvi Jacobsen, sum eftir summarsteðgin hevur spælt við KÍ, hevur tað mesta av árinum drigist við ein skaða í lærkrikanum. Hann hevur kortini spælt við KÍ, men eftir dystin mánakvøldið var greitt, at tað er neyðugt við hvíld, um talan ikki skal verða um kroniskan skaða.

- Tað er so einki, sum vit fáa gjørt við tað. Boðini frá fysioterapeutunum eru púrasta greið. Nevniliga at skaðin krevur hvíld, og so mugu vit laga okkum eftir tí, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari.

Tað er tó eingin ivi um, at Rógvi Jacobsen er ein spælari, sum saknur verður í. Hann er longu nú maðurin við flestu føroysku landsliðsmálunum yvirhøvur, og styrki hansara í luft- og nærdystum er vanliga ein av týðandi fortreytunum fyri føroyska spælinum.

Ístaðin fyri Rógva hevur Jógvan Martin Olsen tikið Høgna Madsen úr ÍF í hópin. Høgni var við í Portugal, men tá hópurin til Serbia-ferðina varð úttikin, var Høgni ikki millum teir 18.

Aðrir menn á skaðalistanum hjá Jógvan Martini Olsen eru Súni Olsen, Christian Lamhauge Holst, Fróði Benjaminsen, Einar Hansen og Arnbjørn T. Hansen.